Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

*8. oktober 2020*

**UMMÆLISSKRIV**

***viðvíkjandi***

**uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)**
(Leinging av rættinum til barsilspening, hækkan av barsilsgjaldinum og broyting viðvíkjandi kærunevndini)

*Leingjan av rættinum til barsilspening*

Fyrst er at siga, at BLF gleðist um, at samgongan leggur upp til at leingja rættin til barsilspening eftir barnsburð við 4 vikum, úr 48 vikum upp í 52 vikur.

Nú barnsburðarfarloyvið við barsilspeningi verður longt upp í eitt ár, metir BLF at tíðin er búgvin at umhugsa tillagingar í skipanini, sum kunnu vera við til at eggja pápum at taka part av farloyvistíðini.

BLF vil her loyva sær at endurgeva úr viðmerkingunum til lógaruppskotið, sum á síðu 8 skriva:

”Hagtøl úr Føroyum og hinum Norðurlondunum vísa, at pápar fara í barsilsfarloyvi so leingi, sum barsilsfarloyvið við lóg er markað til teir. Avleiðingin av lógaruppskotinum kann tí væntast at verða, at mammur fara at vera í barsilsfarloyvi í 48 vikur í mun til 44 vikur, sum nú.”

Mammur í Føroyum taka nógv tann størsta partin av barnsburðarfarloyvinum við 92%, um hugt verður at tølum frá 2017. So hóast foreldur í dag kunnu býta 30 vikur millum sín, so eru tað mammurnar, sum taka meginpartin av barnsburðarfarloyvinum. Samanborið við páparnar í grannalondunum eru føroysku páparnir teir, ið taka minst lut í rættinum til

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

barnsburðarfarloyvi. Í Danmark taka páparnir 10% av farloyvinum, í Finnlandi 11%, í Noregi 21%, í Svøríki 27% og í Íslandi 30%. Føroysku páparnir taka 8% av barnsburðarfarloyvinum.[1]

Verða eingi tiltøk sett í verk fyri at tryggja, at pápar taka ein størri part av barnsburðarfarloyvinum, fer hetta uppskotið at elva til, at kvinnur vera uppaftur longur burtur frá arbeiðsmarknaðinum í sambandi við barnsburð.

Henda fráveran frá arbeiðsmarknaðinum hevur m.a. ávirkan á lønarinntøku, eftirlønarsamansparing og onnur ognarviðurskifti hjá kvinnum í Føroyum.

BLF mælir tí staðiliga til, at tær fýra vikurnar, sum landsstýrið við hesum uppskoti ætlar at leggja aftrat barnsburðarfarloyvinum, verða markaðar til pápan.

## *Smidligari skipan*

Nógv hevur verið tosað um at gera barsilsskipanina smidligari. Á síðu 13 í samgonguskjalinum stendur soleiðis:

"Barnburðarfarloyvið verður longt til minst 52 vikur, og skipanin verður gjørd smidligari. Hetta skal til dømis geva foreldrum møguleika at arbeiða niðursetta tíð og møguleika at ráða fríari yvir farloyvistíðini."[2]

Hetta skrivaðu samgonguumboðini í vinnunevndini eisini tann 27. mai 2020 í áliti til løgtingsmál nr. 121/2019.

Í fyriliggjandi uppskoti sæst tó ikki at vera ætlan um at gera skipanina smidligari, og leggur BLF dent á, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum verða tiknir við, um slíkar broytingar verða gjørdar.

---

[1] Norðurlendska Ráðharraráðið, Nordisk Statistik 2017. Sí eisini *Ymiskar fortreyti: Ein lýsing av vantandi javnstøðuni í Føroyum*, Javnaðarflokkurin á Fólkatingi.

[2] https://www.foroyalandsstyri.fo/fo/landsstyrid/samgonguskjalid/

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

*Inngjaldið hækkar*

Løntakarar skulu sambært uppskotinum rinda meira í barsilsgjaldi. Barsilsgjaldið, ið skal rindast av øllum móttiknum A-inntøkum, verður hækkað úr 0,71% upp í 0,86% frá og við 2021.

BLF harmast um, at tað verður mett neyðugt at hække inngjaldið hjá løntakarum fyri at fíggja broytingarnar í uppskotinum.

*Hoyring*

At enda verður víst á, at tað er óheppið, at uppskotið ikki er sent fakfeløgunum til viðmerkingar.

Landsstýrismaðurin mælir við uppskotinum til týðandi broytingar í barsilsskipanini, sum hava stóra ávirkan á arbeiðsmarknaðin og løntakaran. Slíkar broytingar eiga at verða viðgjørdar saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

**Vinarliga**

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**